ÚT AT KOYRA

# Ford Transit – kann trekkja framman ella aftan

**Ford Transit, ið fyrstu ferð kom á marknaðin í 1965, er nú aftur komin við einum nútímans vøruvogni, sum kann trekkja við framhjólunum ella bakhjólunum, alt eftir hvat hann skal brúkast til**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*



*Ford Transit hevur nú allar møguleikar at verða við í kappingini um miðalstóru vørubilarnar*

### Alt eftir tørvi

Í nýggjari tíð er tað vorðið siðvenja, at vøruvognar í miðalstøddini trekkja við framhjólunum. Ford hevur lagt seg eftir at gera ein bil, sum lagar seg eftir tørvinum hjá tí einstaka kundanum. Lættir vørubilar, sum sjáldan eru munandi lastaðir, klára seg best tá teir trekkja við framhjólunum, meðan teir, sum javnan koyra við tungum lessi, klára seg nógv betur, tá teir trekkja við bakhjólunum.

### Nógvir møguleikar

Nýggi Transit'urin verður gjørdur í fleiri støddum. Sum vørubilur fæst hann í fleiri longdum, við høgum ella lægri taki, sum lastbilur við einkultari ella dupultari kabinu, stytri ella longri aksulfrástøðu, ella sum bussur við upp til 17 sitiplássum. Nógvar praktiskar loysnir verða at velja í, alt eftir hvat bilurin skal brúkast til. Bilurin fæst við 2.0 og 2.4 litur DuraTorq dieselmotorum í støddum frá 75 til 120 hestakreftir, harav teir størru eru turbodiesel við intercoolara.

### "Van of the Year"

Ford Transit, sum verður sýndur fram hjá P/F Wenzel í hesum døgum, bleiv herfyri kosin "Van og the Year" av motorjournalistum við vørubilum sum sergrein. Hjá P/F Wenzel vænta teir sær nógv av nýggja Transit´inum. Hetta er bilurin, teir hava bíðað eftir, tí teir flestu vøruvognarnir í miðalstøddini, sum Transit skal kappast við, trekkja við framhjólunum. Við hesum bilinum hava teir allar møguleikar at verða við í kappingini.

# VR-Bilar hevur móttøku og bilaframsýning



**Í dag, fríggjadagin 9. februar, kl.14.00 hevur nýggja Volvo og Renault umboðið, VR-Bilar móttøku við Hoyvíksvegin**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

*Volvo S60 2.4T í sportsútgávu við leðursetrum*



### S60 við 200 HK

Í hesum sambandi hava teir tikið nýggjar Volvo og Renault bilar heim. Har ímillum hendan Volvo S60 2.4T við 5 syl. motori við lágtrýstturbo og 200 hestakreftum. Bilurin er sera kvikur, og koyrir frá 0-100 km/t uppá 7,6 sekund. Eisini hevur hann t.d. sportslig ljós leðursetur, alu-gearstong, fartpilot, 17" hjól, anti-spinn og aircondition. Volvo S60 er ein rúmligur 5 persóna bilur, sum fæst við nógvari aðrari útgerð, ið kann leverast eftir ynski.

## Hyundai framgongd



Hyundai var tað einasta av 20 teimum størstu bilmerkjunum í Danmark, sum hevði framgongd í 2000. At framgongdin varð 50 prosent størri enn árið fyri, kom av tí góðu móttøkuni, ið Hyundai Accent fekk.

*Kelda: Hyundai Bil Import A/S*

## Corsa umhvørvis virðisløn



Stóra Svenska blaðið "Teknikens Värld", gav Opel Corsa 1,2 umhvørvisvirðisløn í sínum klassa fyri árið 2000. Bilurin koyrdi 15 km pr. litur, og dálkingin var sera lítil.

*Kelda: Opel Danmark*

## Peugeot 607 HDI



Í dieselklassanum fekk Peugeot 607 HDI umhvørvisvirðislønina frá "Teknikens Värld", fyri minstu dálkingina sum er máld í tí klassanum.

*Kelda: Opel Danmark*



ÚT AT KOYRA

# Ford Mondeo 2001 – ein ektaður týskari




*Mondeo sær gott út, koyrir sum ein dreymur og er designaður soleiðis sum týskarar vilja hava hann at síggja út. Hann er eisini ætlaður at blíva ein stórseljari í Týsklandi*

**Í 1993 bleiv Ford Sierra avloystur av Mondeo, sum nú er komin á marknaðin sum ein heilt nýggjur bilur**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

### Framskundaður Mondeo

Kappingin í hesum klassanum er vorðin so hørð, at Ford hevur framskundað framleiðsluna av nýggja Mondeo, sum kom á marknaðin nógv fyrr enn ætlað. Bilurin sær gott út, koyrir sum ein dreymur og er designaður soleiðis sum týskarar vilja hava hann at síggja út. Hann er eisini ætlaður at blíva ein stórseljari í Týsklandi.

*Innan er bilurin týðuliga merktur av, at designarin hevur eina fortíð sum designari hjá Audi*



### Ford Mondeo 2.0 TD Trend

| | |
|---|---|
| Motorurin | 2.0 litur 16V diesel 115 hk v / turbo og intercoolara |
| 0-100 km/t | 10,6 sek. |
| Oljunýtsla | 16,9 km/l |
| Dekkstødd | 205/55-16 |
| Stødd og vekt | |
| Longd | 473,1 cm |
| Breidd | 181,2 cm |
| Hædd | 142,9 cm |
| Eginvekt | 1375 kg |
| Totalvekt | 1975 kg |
| Viðførisrúm | 500 litrar |
| Prísur | kr. 239.000,- (4/hurðar) |
| Søluumboð | P/F Wenzel v.Velbastaðvegin FO-100 Tórshavn Tlf. 313873 |

### Rakt plett

Innan er Mondeo næstan líka rúmligur sum tann størri Ford Scorpio. Bilurin er týðuliga merktur av at designarin hevur eina fortíð sum designari hjá Audi. Hetta ger seg serliga galdandi innan, har man heldur seg vera komnan í ein Audi ella VW. Alt er vælvirkandi og nærmast perfekt.

Teir, sum hava konstruerað bilin, hava rakt plett hvat viðvíkur koyrieginleikunum, sum eru á sera høgum støði. Stoytdoyvarar, fjaðrar og og róðurgreiðir eru so væl sett saman, at tað kann ikki gerast stórt betur. Dekkini, sum eru í støddini 205/55-16, gera eisini sítt til at bilurin er so stúttur at koyra.

### Ambiente, Trend og Ghia

Umframt tað at bilurin kann leverast eftir ynski, verður hann gjørdur í trimum útgávum viðvíkjandi útgerð, Ambiente, Trend og Ghia. Mondeo verður gjørdur sum sedan við 4 hurðum, við 5 hurðum og stórari baklúku, og sum stationcar.

6 motorar eru á skránni, harav 5 eru nýggir. Tveir 1.8 litur bensinmotorar við ávikavist 110 og 125 hk, ein 2.0 litur bensinmotor við 145 hk, og tann kendi 2.5 litur motorurin við 170 hk, umframt tveir 2.0 litur turbodiesel motorar við 90 og 115 hk. Standard útgerðin er m.a. ABS bremsur, dupultur airbag framman, síðuairbag og airbaggardinur, servostýring, sentrallás, startsperra, aircondition, el-rútar og 16" felgur, sum geva pláss til størri og styrktar skivubremsur.

### Tilboð í vikuni

Í sambandi við at bilverkstaðurin hjá P/F Wenzel, er liðugt útbygdur, hava teir í vikuni havt góð tilboð til síni viðskiftafólk, har t.d. olja verður skift á bilunum fyri einans kr. 50,- fyri bæði olju og arbeiði. Eisini hava verið ókeypis kanningar av bilinum, eins og 25 prosent hava verið latin av prísinum á eykalutunum, tá tilboð hava verið givin uppá umvælingar. Leygardagin verður opið frá kl.10-16.